# brúk fyri 30 monnum aftrat



*Skála Skipasmiðja hevur stóran týdning fyri handverksvinnuna á Skála og í Eysturoynni sum heild*

Dánjal sigur, at skipini væntandi verða klár at fara avaftur bedingini í hesi vikuni.

Hann sigur, at í løtuni vita teir einki um nakra aðra leingjan av stálskipum á Skála, men á Tórshavnar Skipasmiðju hava teir eisini sett upp í vestmannatrolararnar hjá Tummasi Christhopersen.

## Onnur skip

Annar av nýggju trolarunum hjá P/F Beta í Saltangará, sum eldur kom í fyrr í ár, hevur leingi ligið við bryggjukantin á Skála, men her hevur skipasmiðjan havt minsta partin av arbeiðnum sjálv.

– Vit hava bara tikið okkum av sentralhitanum umborð á skipunum, sigur hann.

Tað eru Byggiservice og El-Service á Skála, sum hava staðið fyri arbeiðnum at umvæla skipið, sum ætlandi skal verða liðugt í hesi vikuni.

Seinastu dagarnar hevur systurskipið hjá Stelki, Bakur, eisini ligið við bryggjukantin á Skála. Bæði skipini skulu nevniliga hava kryvjimaskinur. Tað er maskinverkstaðurin FJM við Fjøruvegin í Runavík, sum tekur sær av hesum arbeiði.

## Napoléon og Teistin

Tvey onnur arbeiði, sum Skipasmiðjan á Skála eisini hevur at gera, er umbygging av fyrrverandi rækjutrolaranum hjá Torbirni Jacobsen, Napoléon, sum leirvíkingar nú eiga.

– Hetta er stórarbeiði. Maskinan skal umbyggjast til tungolju, og haraftrat skal skipið setast í stand, áðrenn tað fer aftur til fiskiskap, sigur Dánjal Andreassen.

Númánadagintókuarbeiðsmenninir á skipasmiðjuni eisini strandfaraskipið, Teistan, í dokkina á Skála.

– Skipið kemur til árliga klassing og skal eisini málast alt, sum tað er. Ætlandi verður Teistin klárur at fara í sigling aftur um einar fjúrtan dagar ella so, sigur umsitingarleiðarin.

## Stórur russari

Í vikuni kemur eisini ein stórur russari á Skála.

Skipið er 120 metrar langt og skal í dokkina, har eitt nú skrúvubløð skulu skiftast, eins og botn-og síðuventilar skulu eftirhyggjast og møguliga skiftast. Aftrat hesum skal skipið málast, samstundis sum annað viðlíkahald skal gerast umborð.

– Vit hava verið noyddir at siga fleiri arbeiði frá okkum, sigur Dánjal Andreassen.

Hann vísir á, at skipasmiðjan hevur sagt einar tveir russarar og eini tvey føroysk skip frá sær, og hetta kemst serliga av, at dokkin er fult bookað í alt summar.

– Vit noyðast eisini at hugsa um, at tað stundar móti feriutíð, og meðan tann tíðin er, kunnu vit vænta at hava uppaftur minni fólk at taka av, sigur hann.

## Nógv stál

Men tað eru ikki bara skipini, sum geva teimum, ið starvast hjá skipasmiðjuni á Skála, teir nógvu arbeiðstímarnar.

– Vit hava eisini gjørt stórarbeiði fyri brennistøðina hjá IRF á Hagaleiti, og vit skulu eisini gera stórarbeiði fyri KOB-brennistøðina á Hjalla.

Dánjal Andreassen sigur, at arbeiði, sum gjørt er fyri IRF, í høvuðsheitum snýr seg um útbúnað og filtur til reinsan av royki. Uppi í hesum er so eisini sandblásing og máling av stáli, sum verður sett upp á brennistøðini.

– Hetta eru um krøv, ið verða sett til slíka brenning, sum nú skulu fáast frá hondini.

Hann sigur, at arbeiði á brennistøðini á Hagaleiti nú er farið at halla, og síðan verður farið undir at gera nøkulunda sama arbeiði fyri brennistøðina á Hjalla, har teir eru í ferð við at stoypa fundamentið.

– Jú, hetta er stórarbeiði, ið tilsamans snýr seg um eini 120-130 tons av stáli, sigur Dánjal Andreassen, umsitingarleiðari, at enda.




*Teir eru skornir sundur miðskips, og síðan er ein sektión, sum er 1,8 metrar long, sett upp í skipini*